**Tjóðveldi**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 87/2012: Uppskot til samtyktar um avleiðingar av útrásini av KT-virkseminum hjá føroysku peningastovnunum**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um:

> at gera og leggja fyri Løgtingið óhefta frágreiðing, ið lýsir avleiðingarnar – herundir fíggjarligar og fyrisitingarligar avleiðingar fyri fíggjargeiran, bankakundar og føroyska samfelagið – av, at peningastovnarnir hava flutt so at siga alt KT-virksemið til útlond, og lýsir fyrimunir og vansar við at flyta hetta virksemið aftur til Føroya.

**Viðmerkingar**

Føroyski fíggjargeirin er ein týðandi partur av undirstøðukervinum í føroyska samfelagnum, og hava fíggjargeirin og peningastovnarnir sera stóra ávirkan á tær fyritreytir, ið føroyingar, vinnulív og samfelagið dagliga virka innan.

Eisini eru peningastovnarnir ein stórur partur av føroyska vinnulívinum, og eru fleiri hundratals føroyingar í starvi hjá hesum. Hartil nýta peningastovnarnir nógvar tænastur eitt nú KT-tænastur.

Tað er tó sera avmarkað, hvørjar KT-tænastur peningastovnarnir nýta í Føroyum í dag, tí fyri fáum árum síðan fingu peningastovnarnir loyvi at flyta so at siga alt sítt KT-virksemi av landinum.

Ávarað varð tá um, at hetta fór at fáa stórar neiligar avleiðingar fyri føroyska samfelagið. Víst varð á, at hetta fór at kosta bankakundum, føroyskum stovnum og samfelagnum sum heild stórar upphæddir, fór at minka um framtíðar møguleikar, og fór hartil eitt nú at minka talið av vitanarstørvum innan KT í Føroyum.

Ávaringarnar hava nú víst seg at gerast til veruleika.

Tí útrásin av KT-virkseminum hjá peningastovnunum, hevur ikki bert kostað peninga-stovnum og bankakundum 3-siffraða millióna upphædd, hon hevur eisini flutt ótallig vitanarstørv av landinum, minkað um fleksibilitetin í KT-loysnunum hjá peningastovnunum, og hevur hartil dýrkað um KT-loysnir hjá TAKS og minkað um møguleikarnar fyri optimalari KT-stýring og samskipan av føroyskum kjarnu-KT-skipanum.

Sera trupult er tí at síggja, hvat føroyingar og føroyska samfelagið hava vunnið við verandi loysn, og mælt verður tí til, at landsstýrið ger og leggur fyri Løgtingið eina óhefta frágreiðing, ið staðfestir avleiðingarnar av, at so at siga alt KT-virksemið hjá føroysku peningastovnunum varð flutt av landinum, herundir kostnaðin fyri føroyingar, fyri føroyskar stovnar, minkaðu

møguleikarnir fyri menning og samskipan av KT-skipanum í Føroyum, ávirkanin á vitanarstørv o.s.fr.

Hartil verður biðið um eina lýsing av fyrimunum og vansum við at flyta KT-virksemið aftur til Føroya, soleiðis at Løgtingið fær eitt gott grundarlag, um ynskt verður at lóggeva øðrvísi frameftir.

Verður uppskotið framt í verki, ferl hetta at geva eina eftirmeting av tí, ið gjørt varð, tá so at siga allar KT-tænastur hjá peningastovnunum vórðu fluttar av landinum, og hartil geva Løgtinginum neyðuga grundarlagið til at meta um, hvat rættast er at gera frameftir.

**Á Løgtingi, 20. februar 2013**

| | | |
|---|---|---|
| Kristina Háfoss | Gunvør Balle | Høgni Hoydal |
| Bjørt Samulsen | Páll á Reynatúgvu | Sirið Stenberg |